


# Eivør er høvuðsnavn á Tønder Festivalinum

**Á heimasíðuni hjá Tønder Festivalinum verða heiðursplássini givin til Eivør, ið er vorðin eitt stórt navn í lítla suðurjútska býnum.**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

At Eivør eigur nógvar fjepparar í Tønder er eingin loyna, hetta sást millum annað aftur, tá hon vitjaði Tønderhøllina í desember í sambandi við DMA Folk. Tað kvøldið vann Eivør heiðurslønirnar sum besta songkvinna innan danskan fólkatónleik og fyri bestu fløgu við vísusangi. Í døgunum 24.-27. august verður árligi Tønder Festivalurin, og Eivør er eitt av høvuðsnøvnunum á festivalinum. Á heimasíðuni hjá festivalinum, er tað myndin av Eivør og tveimum øðrum, ið prýðir forsíðuna har ein velur mál. Eingin sleppur sostatt inn á síðuna uttan at síggja føroysku songkvinnuna, komin innum er tað myndin av Eivør einsamallari, ið prýðir síðuna.

Eftir Tønderfestivalin í fjør fýltist ummælarin hjá jp.dk á, at konsertin við Eivør konsertin ikki var nóg long, tí honum hevði dámt at lurta í minst ein tíma afturat, og við luttøkuni á ársins festivali fær ummælarin ynski uppfylt. Ummælarin skrivaði eisini at hennara rødd gjørdist stórsta upplivingin á endakonsertini á festivalinum. "I perioder brugte hun stemmen som sit andet instrument foruden guitaren og frembragte stemninger af drama eller skønhed ved ordløs sang - en slags usynlig keyboard. For at udføre dette uden mislyde kræves der megen træning og erfaring, men trods sin alder har Pálsdóttir allerede prøvet meget i et krydsfelt mellem klassisk, folk, jazz og rock."

Eivør luttók fyrr í ár á Roskilde Festivalinum, og eisini á heimasíðuni hjá hesum festivali eru lovorðini til føroysku songkvinnuna stór. Festivalurin skrivar á heimasíðu síni, at fólk beinanvegin kunnu læra seg navnið á Eivør, ið leveraði eina av vakrastu konsertunum á lounge pallinum í ár.



# Týr á Napalm Records DVD

Týr skrivaðu fyrr í ár undir sáttmála við Napalm Records, hetta hevur havt við sær konsertferð, endurútgávu av Eric The Red og upptøku av eini nýggjari Týr fløgu, og nú er bólkurin við á nýggju Napalm Records DVD'ini The Realm Of Napalm Records.

Á fløguni eru tvey sjónbandaløg við Týr, Hail To The Hammer og Regin Smiður, umframt løg við bólkum sum Atrocity, Battlelore, Beseech, Darkwell, Elis, Hurtlocker, Korpiklaani, Lacrimas Profundere, Leave's Eyes, Sinamore, Visions of Atlantis, Live: Enthroned, Saltatio Mortis, Midnattsol og Wigwam. DVD'in er at fáa á heimasíðuni hjá Napalm Records.

Tað gongur væl hjá Týr í løtuni. Sambært Dimmalætting í dag fer bólkurin komandi vikurnar á konsertferð í Týsklandi, Eysturríki, Sveis og Slovenia saman við finska bólkinum Let Me Dream og týsku bólkunum Apokalyptischen Reiter og Hämatom. Konsertferðin byrjar sunnudagin í Berlin og heldur fram til 30. august, tá hon endar við eini konsert í Bern.

**nud**

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!




# Rolling Stone á Summarfestivalin

Millum teir mongu gestirnar til Summarfestivalinum um vikuskiftið verða eisini tvey fjølmiðlafólk úr Russlandi, ið skulu dekka festivalin fyri russiskt tónleikarit og ferðavinnublað.

Nógv fjølmiðlafólk verður til staðar, tá Summar Festivalurin verður hildin um vikuskiftið. Flestu av teimum føroysku miðlunum verða til festivalin, og eisini úr útlandinum koma fjølmiðlafólk at dekka festivalinum.

Millum útlendsku gestirnar eru tveir mans úr Russlandi, sum arbeiða fyri ávíkavist tónleikablaðið Rolling Stone og fyri ferðavinnublaðið Mir. Saman við teimum fer eisini russin Ivan Eginson, sum hevur búð í Føroyum í fleiri ár, at dekka festivalin.

**nud**